Útboð av Server & Storage

Hetta skjal er ein stuttur samandráttur av útboðnum til Server & Storage loysn hjá Sjúkrahúsverkinum. Sjálvt útboðið er á enskum, og er at finna saman við útboðstilfarinum.

Innihald

1. Samandráttur av útboði ........ 3
2. Útboð á enskum ........ 3
3. Prinsippir fyri KT-undirstøðukervið ........ 3
4. Útboðið umfatar ........ 4


J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## 1. Samandráttur av útboði

Sjúkrahúsverkið (SHV) skal endurnýggja KT-undirstøðukervið, tí verandi útgerð er gomul, og garantiið er um at ganga út. Umframt aldurin á teknisku loysnini, er SHV eisini broytt munandi seinastu árini við millum annað fleiri starvsøkjum, starvsfólkum, starvstíðum, skipanum osv., eins og tørvurin á einum 24/7-umhvørvið er vaksin. Tískil verður hildið fast við einari multi-site loysn, ið tryggjar, at tá eitt *site* gerst óvirkið, koyra skipanir víðari sjálvvirkandi út frá einum *High Availability*-prinsippi. Umframt, at tað í størri mun, verður møguligt at dagføra uttan neiliga ávirkan. Eins og verandi útgerð, skal nýggja útgerðin hýsast *on-premise* hjá SHV.

KT-undirstøðukervið verður kallað HEILSUNET, og kervið hýsir nærum 2.500 KT-brúkarum. Brúkararnir eru staðsettir kring alt landið, umframt á Sjúklingahotellinum í Keypsmannahavn. Av teimum gott 2.500 starvsfólkunum, hoyra 1.500 til SHV og restin hoyrir til aðrir stovnar, so sum Heilsutrygd (kommunulæknar), eldraøkið (kommunusamstørv), Gigni, osv.

Orsøkin til endurnýggjanina er í høvuðsheitum:

- Verandi útgerð er gomul og garantiið er um at ganga út,
- Samanleggingin av teimum trimum sjúkrahúsinum hevur økt um virksemið og harvið tørvin á einum nýggjum umhvørvi, og
- SHV miðjar áhaldandi eftir at betra um tænastur til sjúklingin og borgaran, og partur av hesum er eitt nútímans KT-umhvørvi.

## 2. Útboð á enskum

Av tí at verandi veitarar hjá SHV av netverki og datacenter ikki eru føroyskir, og at tekniskar frágreiðingar til m.a. serverar, storage, o.a. nærum altíð er á enskum, metir SHV at sjálvt útboðið og kravfestingar skulu vera á enskum máli. SHV metir at misskiljingar kunnu stinga seg upp millum veitarar og SHV, um útboð og kravfesting verður ein blandingur millum føroysk og enskt, serliga har útlensku veitararnar verða noyddir at umseta. Allir føroyskir veitarar skilja og skriva enskt. Tað verður ikki sett krav, at innkomnu tilboð frá føroysku veitarum skal vera á enskum.

## 3. Prinsippir fyri KT-undirstøðukervið

KT deildin hevur sum mál, at KT-undirstøðukervið er við til at røkka fylgjandi:

- **Business Continuity:** Hóast feilir á hardware ella dátum, skal hetta ikki steðga virkseminum hjá Sjúkrahúsverkinum til at veita tænastu til starvsfólk, sjúklingar ella borgaran.

- **Benefit maximization:** Allar avgerðir viðvíkjandi KT verða tiknar í støði í tørvinum hjá Sjúkrahúsverkinum, soleiðis at hesar nøkta tørvin hjá stovinum sum heild. Hetta merkir millum annað, at tørvurin hjá heildini kemur framum tørvin hjá tí einstaka.
- **Data as an Asset:** Dátur eru konkretar og eitt virði hjá Sjúkrahúsverkinum. Og tá hesar dátur dagliga verða nýttar sum eitt amboð í sjúklingaviðgerð, skapa tær eitt stórt virði. Tískil er neyðugt, at dátur eru skipaðar og stýrdar, umframt at tær eru lagdar fram sum rættar og álítandi.
- **Data accessibility**: Tænastur og dátur skulu til eina og hvørja tíð vera atkomuligar hjá rætta viðkomandi til røttu tíð og rætta stað.
- **Standardization**: Eitt mál er at endurvinna dátur millum skipanir, og tí verða sokallaðir opnir standardir nýttir, har tað er møguligt.
- **Scalability**: KT-undirstøðukervið, -netverk og -skipanir skulu kunna útbyggjast og víðkast, so tær nøkta framtíðar tørvin hjá einum sjúkrahúsverki.

## 4. Útboðið umfatar

Í ensku útboðsútgávuni eru fylgandi kapitlar.

| Veiting | frágreiðing | Kapittul |
|---|---|---|
| 1 | Servers | 5 |
| 2 | Storage og netverk | 6-7 |
| 3 | Backup | 8 |
| 4 | Nearline storage (optión) | 9 |
| 5 | Backup storage (optión) | 10 |